# FRÁGREIÐING FRÁ LØGMANNI 1979

Farna tingár hevur verið hendingaríkt á mangan hátt. Politiskt og vinnuliga eru stórar broytingar farnar fram og eru enn í løtuni rembingar á hesum økjum. Rembingar, sum verða avgerandi fyri møguleikar, rættindi og skyldur hins einstaka borgara.

Hóast menn støðugt í 1978 og serliga farna partin av 1979 hava talað um, hvussu hann dregur á luftina, mugu øll sanna, at ódnin ongantíð brast soleiðis á, at vit ikki kunnu takka fyri eitt gávuríkt og framburðarkent tíðarskeið heilt fram til dagin í dag.

Óvissa um fiskimøguleikar, óvissa um orkuútvegan, óvissa um prísgongd, gjaldjavna og virkismøguleikar á landi merkja útlitið í dag, men tann gongd, verið hevur seinastu 10 árini, hevur - sum eg so mangan havi víst á - styrkt og ment hetta samfelagið, so tað betri er ført fyri at fóta sær, um ólogi ganga á.

Men fyri at hendan menning skal muna, er neyðugt, at ikki fyrilitarleyst verður nýtt av samlaðu tjóðarorkuni, bert til tess fyribils at halda uppi einum virksemi í samfelagnum, sum ikki uppá longri sikt eigur lívsmøguleika. Bert um eisini verður brotið upp úr nýggjum, kunnu vit skapa økt virði og tola uppiløgur á øðrum økjum. Bert við at nýta orkuna sum sáð, ið ger nýggjan gróður, hava vit møguleikar at skáka okkum undan avleiðingum av mótráki uttanum okkum.

Fíggjarliga og politiska rákið uttanum okkum eru vit ov fá og veik til at ávirka avgerandi.

Men eru vit ikki úti um okkum í góðum tíma og skilja rákið, sum uppi er, og tí leika tann leikin, sum hetta rák treytar, so er skjótt, at farið er fyri bakka alt tað, ið bygt varð hesi ár.

Skilja vit rákið, og handla vit gløgt og snarpt, kunnu teir tjansir skapast, sum gera at einki av tí, vunnið er, gleppur okkum av hondum aftur.

Eru vit ov seinir á fótum í hesum málum, kunnu lættliga flokkast okkum afturgongd og arbeiðsloysi

Hetta veri sagt um ein politikk, sum ikki nóg væl og nóg tíðliga verður lagaður til tær umstøður, sum rákið uttan um okkum skapar. Í hesum liggur, at tað er skeivt við nógvum tosi um kreppu í okkara samfelag; í staðin átti meira at verið talað um kreppufyri-

byrgjandi tiltøk, sum minka teir trupulleikar, sum avleiðingar av kreppustøðu í ídnaðarlondunum, hækkandi oljuprísum og øðrum viðurskiftum, vit ikki hava tamarhald á, hava skapt fyri okkara vinnulív.

Tað er nevniliga aðalmunur ímillum kreppuna, sum nú í mong ár hevur herjað uttan um okkum og teir trupulleikar, vit nú hava. Vit hava jú hesi somu ár her heima hjá okkum havt betri lívsumstøður og hægri livifót enn nakrantíð fyrr í okkara søgu.

Men hetta vil eg venda aftur til, tá gongdin, sum verið hevur, og útlitið framyvir eru nærri lýst.

Árið 1977 kom at roynast føroyingum metár, hvat framleiðslu, útflutningi og rentabiliteti viðvíkur, tí er samanbering fyri 1978 og farnu helvt av 1979 við tað árið so natúrlig , men tikið yvir eitt longri tíðarskeið t. d. aftur til fyrst í sjeytiárunum sæst, at talan er um ein javnan vøkstur í okkara samfelag við árinum 1977 í serstøðu, har útflutningsnøgd og -virði, býtislutfall í uttanríkishandlinum og gjaldjavnvág alt togaði rætta vegin. Taka vit samlaðu bruttofaktorinntøkuna hesi ár við í metingina, verða árini 1978 og 1979 ikki at sýna nakra afturgongd, men heldur reella framgongd, eisini sammett við árið 1977. Hendan inntøka verður fyri 1978 helst at toga at 2,5 milliardum krónum, meðan hon í 1977 var góðar 2, og í 1976 1,6 mia. kr.

Fram til 1. juni í ár er útflutningurin umleið hin sami sum sama tíðarskeið í fjør, meðan hann, um vit taka juli mánaða við, er væl størri í ár. Um samlaða útflutningin í 1979 kunnu vit meta, at hann gerst nakað hægri enn í 1978, virðið av fiskaútflutninginum verður størri, og upphæddin fyri útflutt skip kemur at telja meira enn í 1978. Men fyri at røkka upp um útflutningin í 1977, sum var 862 mill. kr., mugu flestar kvotur, okkum eru tryggjaðar, verða veiddar.

Innflutningurin fyrru helvt av 1979 er 41 mill. kr. minni, enn hann var somu tíð í fjør, so har er ein lítil bati í eygsjón, men hvussu nógv orkudýrkanin kemur at hava ávirkað innflutningsprísirnar innan árslok er í løtuni ilt at spáa um. Samanumtikið er tó útlit til eina ávísa minking í samlaða gjaldjavnahallinum í ár.

Uppsparingin í 1978 varð umleið 530 mill. kr. ella eins stór og í 1977, og er hetta enn eitt av prógvunum fyri, at ikki er støðan so hølt, sum summir hinka til.

Býtislutfallið í uttanríkishandli okkara fall í 1978 við 4 stigum úr 95 niður í 91, og er hetta ein av orsøkunum til at gjaldjavnahallið í fjør gjørdist 156 mill. kr. Høvuðsorsøkin var fall í útflutningsvirðinum orsakað av dollarkursfallinum, og tí vit veiddu meir av bíligum fiskasløgum enn fyrr.

At leiðirnar, vit kunnu veiða á, treingjast, er ein veruleiki, og størsta stríð okkara hevur verið at hildið um fiskirættindi á gomlum leiðum í slíkan mun, at umlegging til heimaleiðir og uppbyggjan av nýggjum veiðumøguleikum kundi gerast yvir rímiliga tíð.

Hóast mong hørð orð um mist veiðurættindi, er tað ein veruleiki, at tað er eydnast at halda øllum skipum í vinnu, og framvegis kunnu tey vera tað restina av árinum innan fyri teir kvotukarmar, sum fingnir eru. Annað er so tað, at tørvandi rentabilitetur hjá pørtum av vinnuni og fiskaloysi á nógvum leiðum gera at k inkur er í. Eitt fiskaloysi, sum flesta staðni er orsakað av serligum hitabroytingum í sjónum, men eisini tí ovveitt hevur verið. Afturat hesum kemur, at veðrið í vetur tarnaði heimaróðrinum nógv.

Inntil 1. juli í ár er heildarveiða okkara í tonsum 146.000, mótvegis 167.000 í fjør ella 19.000 tons færri, og er tað serliga lodnu undan Íslandi, toski úr Barentshavinum, rækjum undan Grønlandi og svartkjafti av Føroya-økinum, sum minni er veitt av í ár. Men útflutningsvirðið av tí, veitt er, er størri enn í fjør.

Nevndi í fjør, at tann umrøða, Føroyar fekk uttanlanda, sum landið har alt búskaparliga gekk øvugt av búskaparligu gongdini aðarastaðni - sum landið,ið fleyt í hunangi - var vandamikil fyri okkara møguleikar fyri at basa fylgjunum av teirri óvissu, vit livdu í.

Eins vandamikið er at fara hin vegin!

Vit mugu avvegaðog objektivt meta okkara møguleikar til einahvørja tíð og ikki vaksa ella minka teir í taktiskum orðavali og politiskum tjaki.

Gera vit ikki okkum sjálvum greitt hvørja løtu, hvar vit flóta, og hvørja leið rákið ber, gerast tiltøk okkara skeiv og meira til skaða enn gagn. Tað stendur framvegis fast, at vit koma at vera fyri bakkøstum, tí møguleikar knappliga ganga undan, og tí mugu vit øll standa á varðhaldi og bera upp í liðini allastaðni har ágangur er.

Vit skulu sjálvt við minni veiðunøgd, men øktari viðgerð tryggja tann til samfelagsraksturin neyðuga búskaparliga vøksturin.

Men samstundis mugu vit aftur læra at meta sum virði aðrar lívsumstøður, sum ikki júst eru so tengdar at teimum nýtslumøguleikum, sum ótálmað brúk av náttúruvirðunum skapa í teirri orkukrevjandi framleiðsluni.

Fólki okkara er eisini í komandi tingsetu tryggjað, at hin einstaki ikki inntøkuliga sæð kennir seg verri fyri enn áður. Hetta tryggjar tann útjavningarpolitikkur, sum fer fram yvir skatta- og studningsskipaninar, og hetta medvirkar tann búskaparliga stabiliseringin við ríkisveitingum til, men skal hetta halda fram, er neyðugt, at javnvág er ímillum møguleikar, neyðuga stabilisering og nýtsluvíðkan. Eisini er neyðugt at prioritera íløgurnar so, at tær - skaptar heima ella læntar uttanlands - koma teimum framleiðslufremjandi og kreppu-fyribyrgjandi tiltøkunum fyrst tilgóðar.

Hesi tiltøk koma flest øll at miða ímóti at dubba okkum best møguligt til broyttar umstøður, til økta flakavirkisorku, til stýring og fígging av landbúnaðinum, til økta farma- og ferðamannasigling, til fjøltáttan av ídnaðinum og ikki minst til orkuútvegan. Skal hetta røkkast, er avmarkað, hvat hin einstaki fær í sín lut av materiella vøkstrinum, men eigur hann framvegis tað arbeiðssemi, ta virðing fyri materiellum virðum og tað skynsemi í umsiting, sum forfedrar okkara áttu, er hann við til at tryggja, at vit framvegis eiga eitt gott samfelag, eitt sterkt samfelag og eitt ríkt samfelag.

Skal hin einstaki kenna sína ábyrgd her, er meira neyðugt enn nakrantíð, at politiskt verður skipað so fyri, at hansara medvirkan og hansara medavgerð veruliga telja.

-------------

Tað hevur verið siður, at løgmaður á ólavsøku ummælir mong samfelagsøki hvørt sær, fíggjar- og skattaorku, skiparaksturin sundurgreinaðan, ídnað og landbúnað, samfelagsútbyggingina innan heilsuverkið, sosiala økið, vegagerðina, samferðslu- og kommunikatiónsøkið, húsabyggingina, skúla- og mentunnarmál og mangt, mangt annað.

Hetta varð rættuliga gjølla gjørt við ársbyrjan, og vil eg í ár tí bert stutt minna á, at á øllum hesum økjum, í øllum samfelagsins liðum er framvegis gróður, útbygging og menning, og minna á, at hetta hava vit orkað, tí framleiðsla okkara er so hampuliga stór, og tí aðrir hava havt álit á búskapi okkara.

Støðan er annars rættuliga væl lýst í teim mongu skjølum og tí taltilfari, sum er hjálagt hesi røðu.

----------------

Framhaldandi fara vit eisini at orka útbygging og menning, men karmur okkara í fiskivinnu tykist skjótt settur, so at skilja, at vit kenna avmarkingarnar og møguleikarnar fyri at troyta royndar og óroyndar leiðir enn betri, tí eigur nú at verða lagdur so stórur dentur á at fyriskipa aðrar vinnuvegir afturat, hóast verandi kunnu útbyggjast munandi enn. Hetta krevur politiskar umstøður hjá tí almenna at fyriskipa enn betri, stýra meira skynsamt og samvirka dyggiligari við landsins borgarar. Tí bátar ikki, at vit royna at fáa hesar at falla í fátt við at mála daprar framtíðarmyndir um búskaparligt óføri fyri teimum, og hetta, tí okkum tørvar tað, teir kalla visiónir - evnir til at síggja nýggjar møguleikar - og dirvi til at fremja teir.

Nei, vit mugu kalt og hóliga tala um tingini, sum tey eru, arbeiðarin, fiskimaðurin, vinnulívsmaðurin, politikkarin og hvør einstakur borgari, skulu vit seta okkum nýggj mál og mið.

Av hesi orsøk vil eg heldur tala meira um búskaparligu støðu okkara sum heild, heldur enn um tey einstøku samfelagsøkini.

Fiskivinnumøguleikarnar, sáttmálarnar við onnur lond og framleingjan teirra hava vit umrøtt so ofta, men lat meg siga, at eg meti møguleikar at vera fyri at fremleingja teir allar í nakað broyttum líki og at fáa í lag onkran nýggjan eisini fyri komandi ár.

Landbúnaðarútbyggingina og ídnaðarútbyggingina orka vit eisini at halda í gongd og menna.

Hesi trý øki vóni eg, at sjálvt teir, sum alla tíðina tala um búskaparliga kreppu í Føroyum, duga at síggja onkra vón fyri. Tað duga teir, um teir vilja vera sannir.

At nýlendi verður útlagt, har okkum óroyndir vinnuvegir finna grund, er straks torførari at skapa fatan fyri hjá øllum, at óroyndir søluvegir verða gingnir, at orkan kann fáast til vega á annan hátt, at vit mugu førka okkum eitt vet burtur frá monopolstøðuni innan ávís vinnuøki, at virkir til viðgerð av ónýttum

fiskastovnum og skip til veiðu av teim skulu byggjast (svartkjaftur, gulllaksur, lodna, blálonga, langasporl), at fiskaaling má útbyggjast í stórum málistokki, at almenna umsitingarorkan (og umsitingarhjálpin) má styrkjast, at óskattaða nýtslan kann fíggja, at farma- og ferðamannasiglingin kann geva hundraðir av milliónum, at ein samskipað og konsessionerað ferósla á landi gevur stóra sparing, og at ein samskipan av innkeypi og effektivari príseftirlit best tálmar inflatiónini, tykist tað vónleyst at skapa breiða semju um.

Men fremst av øllum, so kann eingin meiriluti skapast fyri, at hesi framstig má og eigur hitt almenna dyggiliga at fyriskipa, skulu privatir orka at lyfta uppgávurnar og kenna eggjan til at fara undir tær við ábyrgd yvir fyri okkara felags húsarhaldi.

Kortini vænti eg, at fatanin av, nær kappingarfilosofiin, og nær samtaks- ella felagshugsjónin orka at loysa uppgávurnar, fer at gerast meira útgreinað og greið í komandi tíð.

Við øllum hesum møguleikum, og tí búskaparliga støðan er so sterk, sum hon er, er hendan talan um kreppu rættuliga ábyrgdarleys, tí hon kann sjálvsagt fáa fólk at halda, at vit í Føroyum eru um at koma í somu óloysiligu trongstøðu, sum tey mongu ídnaðarlondini eru í.

Tað ber ikki til at gloyma, at tað er ein avgerandi munur í millum ta djúpt gangandi kreppu, sum flestu ídnaðarlond eru í, og so hinvegin teir vinnuligu trupulleikar okkara samfelag hevur í løtuni.

Kreppan hjá ídnaðarlondunum er eyðkend av stórum arbeiðsloysi, ov høgum framleiðslukostnaði á útflutningsvørum, einum kostnaði, sum menn meta stava frá einum ótálmaðum lønarvøkstri.

Onnur eyðkenni eru vaksandi trupulleikar við at økja um útflutningsvirði og nøgd, tí kreppan er so víttfevnandi. Hetta saman við hækkandi oljuprísum hevur skapt stórar gjaldjavnatrupulleikar og eina inflatión, sum tykist torfør at temja. Stjórninar hava sett búskaparlig tiltøk í verk, sum mest miða ímóti at minka um lønarvøksturin, hækka útflutningsvirðið og minka um innflutningin.

Okkara trupulleikar stava eisini frá hækkandi framleiðslukostnað. Men hesin hækkandi framleiðslukostnaður stavar at kalla bert frá teimum hækkandi oljuprísunum.

Harafturímóti eru vit spard fyri arbeiðsloysi, og álvarsamar sølutrupulleikar hava vit ikki. Gjaldsjavnahall Føroya er í størra

lagi, tó ikki størri enn, at útheimurin framvegis hevur álit á føroyska búskapin.

Hóast okkara trupulleikar ikki kunnu sammetast við teirra, eru trupulleikar okkara álvarsamir nokk, og eiga vit tí longu nú at seta í verk skilagóð kreppufyribyrgjandi tiltøk.

Høvuðsendamálið við hesum tiltøkum eigur sjálvsagt at vera hetta at halda vinnuhjólunum gangandi og harvið sleppa undan tí arbeiðsloysi, sum er hin daprasta fylgjan av eini og hvørjari búskaparkreppu.

Tað er helst skilagott, at hesi krepputiltøk í fyrstu atløgu umfata eina fleirtáttaða bráfongishjálp til øll fiskiskip, so tey ótarnað kunnu halda fram í vinnulívinum. Hetta merkir ein rakstrarstudning í mun til hækkandi oljuútreiðslurnar og lætta í avdráttarbyrðunum.

Harnæst eiga vit í aðru atløgu longu nú at fyriskipa meiri langsiktaðum og varandi búskaparligum tiltøkum.

Tiltøk, sum skulu tryggja okkum hóskilig skip og harvið ein framleiðslukostnað, sum framleiðslan sjálv so vítt møguligt kann bera, (t. d. tykjast meðalstórir trolararnir ikki veiðueffektivir til at royna nóg víða á Føroyaøkinum, vit mugu/og skulu stuðla, meðan spakuliga verður útskfit, vit eiga einki nótaskip, sum stendur mát, skal teir hugsast um at nýta/nýggju møguleikarnar, vit eiga eingi skip, sum árið runt kunnu veiða 200-600 tons av svartkjafti pr. viku til matvøruframleiðslu, allir okkara motorar brenna ta dýrastu oljuna o. s. fr.; úrslitið av hesum kann gerast, at okkara veiðumenn eins og farmasiglingarmenninir fara í vinnu hjá teim, sum hava hesi før.)

Hesi tiltøk eiga eisini at miða ímóti at økja um okkara útflutningsvirði, samt ímóti at økja um framleiðsluna av vørum, sum í dag verða innfluttar, (at virkini ikki eru bundin av at framleiða júst tað, sum sølusamtakið fyrisetur, men t. d. ótarnaði kunnu gera royndir við 10-20% av rávøruni, meðan 80-90% fara til meginframleiðsluna, at neyv avvegan verður ímillum tann møguleika, vit hava til at tálma prísvøkstri við at keypa avlopsframleiðslu frá øðrum og so øking av innlendis framleiðslu, at føroysku arbeiðstakarar gerast førir fyri at átaka sær øll arbeiði, teir kunnu gera eins biligar og aðrir, tá sama kappingarføri, sum útlendingar hava, er veitt teim, hvat stuðuli og fígging viðvíkur o. s. fr.)

Fremst av øllum mugu tiltøkini bera við sær eina veruliga herferð ímóti orkuoyðsli og eiga í sær møguleika fyri at útloysa alternativar (aðrar) orkumøguleikar.

Í teim loysnum, vit velja, mugu vit leggja dent á ikki at skerja almenna virksemið, har minsti vandi er fyri, at harav fylgir arbeiðsloysi.

Røddir vóru frammi í 1975 og eru tað aftur nú, sum mæla til álvarsligar niðurskurðir. Onnur lond hava roynt hetta, men einki prógv er fyri at niðurskurðir yvirhøvur virka kreppufyribyrjgandi.

Vit mugu leggja dent á at fyribyrgja ungdómsarbeiðsloysi, og vit mugu leggja dent á at hava við í planleggingini fakfeløgini, vinnulívsfeløgini, stovnar og serfrøðingar.

Eydnast ein búskaparpolitikkur eftir hesum høvuðslinjum, eru góðar vónir um, at vit fara at megna at styrkja okkara búskap og bøta munandi um gjaldjavnan.

---

Hvørjar <u>møguleikar</u> hava vit so fyri at verja búskap okkara móti kreppu?

Vit hava tann <u>fyrimun</u>, at vit mótsett mongum øðrum tjóðum hava rættuliga fríar hendur til at seta í verk búskaparlig tiltøk, (eru ikki bundin av EEC- ella øðrum reglum í sama mun).

Hetta frælsi hava vit ikki nýtt, tí hava bankar okkara kunna økt uttanlandaskuldina við lántøku til goymsluhús o.a. uttan samskipan við almenna lánipolitikkin.

Við landsbankanum fáa vit eitt tól til fyriskipan av slíkum tiltøkum og samskipan teirra við politikk bankanna, kommunannna, teirra privatu og landsstýrisins.

Vit hava <u>tann fyrimun</u>, at vit í løtuni hava <u>eina orsøk</u> til tann hækkaða framleiðslukostnaðin, og hon er nærum bert hin eina <u>oljuprísirnir</u> og ikki lønarvøksturin.

Vit hava <u>tann fyrimun</u>, at vit eiga vinnulívsmenn, fiskimenn og arbeiðsfólk við áræði, sum áður hava sýnt vilja og evni til at lofta broyttum vinnuumstøðum.

Vit hava tann fyrimun, at vit, sum longu nevnt, hava uppbygt eitt sterkt samfelag við vælvirkandi stovnum, samt at partar av vinnuni eru væl konsolideraðir.

Men sjálvandi eru og verða viðurskifti, sum vit ikki eru harrar yvir, sum koma inn yvir okkum uttanífrá.

Hetta krevur, at allar góðar kreftir finna saman og semjast um tiltøk, sum kunnu halda kreppuni frá durunum. Tá vit hugsa um, hvussu skaðilig henda kreppa hevur verið fyri fjøld av fólki í okkara grannalondum, bæði socialt og politiskt, skuldu vónir verið um, at menn og flokkar finna fram til skilagóðar loysnir, hóast fløktu politisku viðurskiftini.

---------------

Hesi eru í ólagi, tað er eingin loyna. Javnaðarflokkurin hevur boðað frá, at fólkaflokksins støðutakan í teimum samráðingum, sum máttu vera aftan á landsfund javnaðarflokksins, har sligið varð fast, at fólkaflokkurin var gingin frá samgongusáttmálanum, var sovorðin, at einki grundarlag var fyri framhaldandi samstarvi ímillum hesar báðar flokkar.

Kortini situr landsstýrið, valt av teim trimum flokkunum, framvegis, og tað hevur skyldu til at virka dyggiliga og skilagott við øllum samfelagsmálum inntil tann dagin, eitt annað stýri tekur við, ella inntil verandi stýri er umskipað.

Umboð javnaðarflokksins í landsstýrinum leggja tí fyri samstarvsmenninar har tey nágreiniligu uppskot um kreppufyribyrgjandi tiltøk, sum flokkurin hevur útarbeitt, bæði viðvíkjandi stuttfreistaðum tiltøkum og eini langtíðarætlan. Henda ætlan verður saman við uppskotunum frá hinum flokkunum viðgjørd, og hevur landsstýrið skyldu til, beinanvegin at koma til tingið við einum uppskoti til loysn.

Spurningurin er so, um ikki tingið eigur at taka sær tíð til at avgreiða hetta mál, áðrenn farið verður undir ta politisku uppgerð, sum verandi ósemja krevur.

-----------------

Í undanfarna havi eg vegna landsstýrið roynt at tala um støðu tjóðarinnar, soleiðis sum tað er væntað av formanni landsstýrisins.

Men tað skerst ikki burtur, at í verandi støðuni er væntað ein meira politiskt merkt lýsing av teim orsøkum, sum elvdu til samgonguslitið og av teim avleiðingum, sum hetta vil fáa.

Vil loyva mær at gera tað, og verður henda lýsing merkt av, at eg umframt at vera formaður í landsstýrinum eisini eri limur og formaður í einum av teimum flokkum, sum valdu hetta stýrið.

------------------

Sum eg nevndi við tingslitið í mai, hevði javnaðarflokkurin mett, at tann prís vit rindaðu í atkvøðum við valið í 1978, aftaná at hava havt ábyrgdina av leiðsluni av landsins stýri í 16 av 2o árum, var tað rímuligt at bera, tí so mikið av javnaðarpolitikki hevði ein kunnað rikið sum part av einum tillagingarpolitikki ímillum borgarlig og sosialdemokratisk sjónarmið, at politiskt og fyri hin einstaka borgaran royndist skurðurin góður.

Vit sóu við ársskiftið, at eingin onnur samgonga enn hon, sitið hevði, kundi skipast, og løgdu tí okkara lut til, at eitt samgongugrundarlag fekkst til vega. Eitt grundarlag sum sýndi vilja til at virka fyri heildina uttan at køva rættin hjá einstaklingum og bólkum.

Hóast samarbeiðið frá 1975-78 gekk rættuliga væl, tóktist longu undir samgongusamráðingunum at vera torførari at røkka semju. Valúrslitið, sum gav borgarligan meirluta, spøkti væl, men ein gav tí ikki gætur nóg mikið, serliga ikki at tað fór at gerast møguligt at spæla upp til hinar borgarligu flokkarnar ímóti tí skrivaða orðinum í samgongusáttmálanum.

At hetta er gjørt, er okkara tulking. Aðrir kenna seg - siga teir - ikki sekar í nøkrum avviki frá givnum lyftum.

Tað gjørdist skjótt greitt, at tær avbjóðingar, sum lógu fyri framman, kravdu munandi størri medvirkan frá samfelagsins síðu enn áður, munandi sterkari ígongdsetan og fyriskipan enn áður, serliga til at ganga óroyndar leiðir, skuldi ikki øll samfelagsorkan fara í beinleiðis studningi, sum tænti tí endamáli at halda hjólini í gongd, men sum eisini - hendi ikki annað - bleiv tærd upp í nýtslu, sum ikki skapar nýggjar møguleikar.

Roynt var tí at ganga nýggjar leiðir á summum økjum, men hildu vit okkum skjótt kenna eina ávísa darvan frá fíggjarnevndarleiðsluni, eina darvan sum forðaði skjótum og effektivum atgerðum til nýskapan. Hendan blokaduroynd kundi við tí borgarliga meirilutanum aftanfyri skjótt gerast so effektiv, at okkara stýrislag avskeplaðist. Tí tað hevur ongantíð verið tann parlamentariska meiningin, at ein stjórn bert skal umsita viljan hjá leiðsluni í eini løgtingsnevnd, men at hon skal fyriskipa og stýra, stinga út í kortið, leggja uppskot fyri lóggávutingið og veita sær heimildir og taka ímóti heimildum frá hesum.

Landsstýrið fekk við valið 23. januar ikki allar atkvøður samgongunnar, kanska liggur her orsøkin til royndina hjá fíggjarnevndarleiðsluni at seta seg sum hægsta umsitingar- og politiska vald, og kanska liggur her spírin til, at neyðuga álitið millum flokkarnar vísti seg ikki at vera til.

Vit gjørdu skjótt greitt, at vit ongantíð fóru at góðtaka <u>bert</u> at umsita ein politikk, sum er útstungin av borgarligum flokkum.

Eg undirstriki orðið <u>bert</u>, tí roynt hevur verið at siga, at javnaðarflokkurin á óparlamentariskan hátt vildi nokta at umsita avgerðir, sum vóru í tráð við borgarliga hugsan, tað vildu vit ongantíð loyvt okkum, men vit vildu ikki <u>bert</u> gera hetta, men eisini umsita hin partin av avtalunum, nevniliga tey tiltøkini, sum skulu fremjast av samfelagsorsøkum, tiltøk , sum eisini eru samfelagsins menningarmál, men har hin einstaki ikki røkkur, og tað almenna tí má ganga á odda.

Vit vistu, at umbýti av pørtum av samfelagsognini skuldi fremjast, tí viðurskifti uttanum okkum komu at nerva okkara búskap, men vit vildu ikki góðtaka, at hetta hendi á tann hátt, at áhugamál hjá nøkrum fáum skúgvaðu onnur til viks. Vildu ikki at almenn luttøka uttan medavgerð kundi misnýtast, tí almenn luttøka, hóast flestu ynskja hana, kennist mongum ringur ráki.

Fólkaflokksins hugsan, at okkara trupulleikar kunnu loysast eftir liberalum grundreglum og javnaðarflokksins, at hetta ikki letur seg gera, men at tí almenna nú má loyvast at taka initiativir, hevur tað sýnt seg ógjørligt at sameina, ikki bert í einum einstøkum máli, men yvirhøvur, og noyddist javnaðarflokkurin tí at taka hetta sum orsøk til samgonguslit. Vit kundu ikki góðtaka, at minsti flokkurin í samgonguni tiltók sær vetorætt á økjum, har vit mettu greiðar

reglur vóru avtalaðar frammanundan, tá vit frammanundan fult og heilt í samgongu grundarlagnum høvdu tikið hædd fyri, at javnaðarflokkurin bert átti 8 av 32 tingmonnum, og tí bert kundi fáa ávísan part av hugsanum sínum við í setningin. Men hesin parturin skuldi eisini fremjast.

Tað hevur verið roynt at einfaldgera ósemjuna á slíkan hátt, at málið bert snýr seg um keyp av einum skipi - stuttleikaskipi verður hartil lagt - soleiðis er tað ikki. Talan er um grundleggjandi ójavna í støðutakan til vinnulívs- og aðra útbygging. Fyri okkum hevur keyp av skipum fleiri endamál, bøtan av almennum tænastuveitingum, skapan av nýggjum vinnuvegi til teir hundraðir av útbúnum monnum, sum nú virka fyri aðrar í kapping við okkara áhugamál, bøtan av gjaldjavnshalli okkara (og telur hvør króna her dupult, tí hon er einaferð spard og einaferð vunnin) og seinast,men ikki minst kapitaltilvøkstur av hesi vinnu fellur í okkara samfelag og ikki uttanlands og mennir harvið okkara møguleikar til at útbyggja nýggj øki.

At keypa skip til stuttleika hevur als ongan áhuga.

Vit hava merkt blokaduna á øðrum økjum við, økjum har tørvandi loysn vil bera í sær enn ein útflutning av "know how", vitan og dugnaligheit til aðrar, tí okkara menn fara í teirra tænastu.

Vit sita so eftir á berum.

Javnaðarflokkurin hevur einki ynski um at leggja frá sær. Tvørturímóti vil hann fegin framvegis taka við ábyrgd.

Hetta gjørdi hann í 1959-63 og 1967-79, men skal hann vera við, er fortreytin, at útlit er til úrslit og veruligan framburð, soleiðis sum hesi skeið góvu. Bert at umsita hevur ongantíð verið okkara ynski. Vit kenna skyldu til eisini at stýra og fyriskipa.

Úrslit verða bert rokkin í semju. Føroyingar hava upplivað naggatóðn, tá innanhýsis klandur eyðkendi eitt stjórnarskeið.

Slíkum viðurskiftum ber ikki til at arbeiða undir, skal vinnast á trupulleikum heldur enn at tjakast um, hvussu ein fær teir til viks.

Javnaðarflokkurin metir, at í summum málum er fólkaflokkurin gingin frá teim lyftum, vit hildu hann hava givið, men tað er eingin í javnaðarflokkinum, sum sigur fólkafloksmenn ringar fyri at hava aðra meining um, hvat avtalað varð, ella fyri nú at gera greitt, hvussu langt teir vilja ganga. Tað má so bert gerast greitt, at grundarlagið fyri samarbeiði ella úrslitum ikki er til staðar.

Avleiðingarnar av hesum tí verða at taka.

Javnaðarflokkurin hevur mett, at hin rættasta avleiðingin var eitt nýval, og mett at eitt slíkt vildi givið honum styrki til at tikið við leiðsluni av nýggjari samgongu.

Men hvussu eru annars viðurskiftini, tá ein samgonga ikki

longur ætlar at samarbeiða?

Semjan um samanseta av landsstýri byggir á eina avtalu um ein ávísan politikk, og ein meirluti avtalar hendan politikk.

Sjálvt um lóggávan bert krevur ein meirluta, tá landsstýrið verður valt, og ikki krevur at landsstýrið fer frá, um tað í valskeiðinum vísir seg, at hesin meirlutin ikki longur er til staðar, so má tað metast at vera rætt, at eitt landsstýri undir hesum umstøðum leggur frá sær so skjótt, sum tað er gjørligt at skipa eitt annað landsstýri.

Sambært løgtingslóg um umboðsvald Føroya er landsstýrið valt fyri alt valskeiðið hjá løgtinginum. Leggur løgmaður ella landsstýrismaður frá sær í valskeiðinum, skal løgtingið velja annan løgmann ella landsstýrismann. Lógin sigur harímóti einki um, hvat henda skal, um eitt landsstýri leggur frá sær vegna politiska ósemju.

Eg vil meta, at um eitt landsstýri vil leggja frá sær vegna politiska ósemju, er rætta leiðin at ganga at útskriva val av nýggjum. Henda rætt hevur landsstýrið ikki; til hetta krevst løgtingssamtykt. Samtykkir løgtingið ikki nýval, meti eg, at tingið hevur rætt til at velja landsstýri av nýggjum. Summir løgfrøðingar meta tó, at eitt landsstýri bert kann fara frá eftir nýval.

Men tað er vert at gera sær greitt, at fyri tað um javnaðarflokkurin sigur samstarvið við fólkaflokkin upp og ynskir eitt nýtt landsstýri skipað, so skal sitandi landsstýri virka, ikki bert sum eitt sokallað forrætningsministerium, men á øllum økjum, har tað er valt til at virka.

Landsstýrið vil tí ikki útskjóta mál sum t. d. hjálp til fiskivinnuna, meðan bíðað verður eftir einum nýggjum landsstýri.

Eg vil enda við at undirstrika, at samarbeiðið ímillum fólkaflokkin og javnaðarflokkin er slitið.

Javnaðarflokkurin fer tí at leggja uppskot fram um nýval, men vit meta, at løgtingið áðrenn eigur at viðgera og samtykkja slíkar fyribils hjálparveitingar til fiskiskipaflotan, at hesar fáa gildi í seinasta lagi 10. august í ár.

Kann flotin soleiðis ótarnaður halda fram, eru líkindir og stundir til politisku uppgerðina og viðgerðina av uppskoti okkara um val.

Eg ynski tinginum og tingmonnum eydnu til at taka tær fyri fólk og land skilabestu avgerðir í hesum málum.